GRANSKINGARDEPILIN FYRI SAMFELAGSMENNING



# Føroysk sjófólk, sum sigla í øðrum londum

Magni Laksafoss og Dennis Holm

ARBEIÐSRIT 22/2009

ISBN 978-99918-60-14-5

# Føroysk sjófólk sum sigla í øðrum londum

Magni Laksáfoss og Dennis Holm

*Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 22/2009**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú verða umbidnar kanningar, t.v.s. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit verða altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Føroysk sjófólk sum sigla í øðrum londum**

Magni Laksáfoss og Dennis Holm 2009
Útgevari: Granskingardepilin fyri Samsfelagsmenning, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið.
Prent: Prenta
ISBN: 978-99918-60-14-5
ISSN: 1601-9423

# Innihald

FORMÆLI ........ 6

SAMANDRÁTTUR ........ 7

DANSK SAMMENFATNING ........ 9

INNGANGUR ........ 11

1. ARBEIÐSMARKNAÐURIN OG FØROYSK SJÓFÓLK ........ 12

1.1. FØROYSKIR SJÓMENN Í ØÐRUM LONDUM EIN ALDARGOMUL TRADITIÓN ........ 12

1.2. Í ARBEIÐSMARKNAÐARPOLITISKUM LJÓSI ........ 13

2. SKIPANIR OG UMSTØÐUR HJÁ FØROYSKUM SJÓFÓLKUM Í ØÐRUM LONDUM ........ 17

2.1. SJÓFÓLK OG ALTJÓÐA SKIPASKRÁSETING ........ 17

*2.1.1. Bakgrundin fyri altjóða skipaskrásetingum ........ 17*

*2.1.2. Dansk International Skibsregister (DIS) ........ 18*

*2.1.3. Norsk Internasjonal Skipsregister (NIS) ........ 20*

2.2. TVÍSKATTASKIPANIR ........ 22

*2.2.1. Føroyingar, sum sigla við grønlendskum skipum ........ 23*

*2.2.2. Føroyingar, sum sigla í Kanda ........ 25*

3. FØROYSK SJÓFÓLK Í ØÐRUM LONDUM OG ÁRIN Á BÚSKAPIN ........ 26

3.1. FØROYSK SJÓFÓLK Í ØÐRUM LONDUM Í 2008 ........ 26

3.2. FØROYSK SJÓFÓLK Í ØÐRUM LONDUM, 1998-2008 ........ 27

3.3. FØROYSK SJÓFÓLK Í DIS ........ 28

3.4. FØROYSK SJÓFÓLK Í NIS ........ 30

3.5. FØROYSK SJÓFÓLK Í GRØNLANDI OG KANADA ........ 31

3.6. FØROYINGAR SIGLA SUM YVIRMENN ........ 32

4. INNTØKAN HJÁ FØROYSKUM SJÓFÓLKUM Í ØÐRUM LONDUM ........ 34

4.1. MIÐALINNTØKAN HJÁ SJÓMONNUM Í ØÐRUM LONDUM ........ 34

4.2. SAMLAÐA INNTØKAN HJÁ FØROYSKUM SJÓFÓLKI Í ØÐRUM LONDUM ........ 35

5. INNTØKAN SKAPAR UMFAR Í FØROYSKA BÚSKAPINUM ........ 37

5.1. VØRU- OG TÆNASTUKEYP SKAPA RINGÁRIN ........ 37

5.2. GRUNDARLAG UNDIR ALMENNUM VIRKSEMI ........ 38

5.3. SAMLAÐA ÁRINIÐ Á BÚSKAPIN ........ 39

5.4. INNTØKUR FYRI LAND OG KOMMUNUR ........ 40

6. GONGDIN UNDIR DIS-SKIPANINI ........ 42

FYLGISKJAL 1. FYRITREYTIR FYRI ÚTROKNINGUM AV ÁRINUM ........ 44

KELDUR ........ 46

## Myndir

Mynd 1: Arbeiðsmarknaðir føroyinga. Myndin lýsir, hvussu arbeiðsmegin, búsitandi í Føroyum, er býtt upp á ymiskar arbeiðsmarknaðir, og hvussu hon stundum fer bæði um landamørk og fakmørk........................ 15
Mynd 2. Føroysk sjófólk í øðrum londum í 2008. Meiri enn helmingurin av føroyskum sjófólkum í øðrum londum arbeiða undir DIS-skipanini. Triðingurin er undir NIS-skipanini, meðan restin siglir undir Grønlandi og Kanada. ........................................................................................................................ 26
Mynd 3. Føroysk sjófólk í øðrum londum, 1998-2008. Talið av sjólki hevur ligið um 700, men er í 2008 vaksið til næstan 1.000. ....................................................................................................................... 28
Mynd 4. Talið av føroyskum sjófólkum, sum sigla undir DIS, hevur ligið nøkulunda støðugt um 400 til 450. Í 2008 er talið komið upp á 512.................................................................................................................. 29
Mynd 5. Talið av føroyskum sjófólki, sum sigla undir NIS, er vaksið mundandi síðan 2001. ............................... 30
Mynd 6. Útlendsk sjófólk í Grønlandi. Stórur partur av útlendskum sjófólki í Grønlandi eru føroyingar. ............ 31
Mynd 7. Føroysk sjófólk í DIS-skipanini. Flestu føroyingar undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn.................... 32
Mynd 8. Miðalinntøkan hjá sjófólki undir NIS og DIS og undir Grønlandi.......................................................... 34
Mynd 9. Samlaða inntøkan hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum. ................................................................. 35
Mynd 10. Nýtslan av uttanlandssjóinntøkuni er við til at skapa virksemi í føroyska samfelagnum. Hetta virksemið er roknað til uml. 67 mió. kr. í 2008. ......................................................................................... 38
Mynd 11. Uttanlandssjóinntøkurnar og avleidda virksemið er við til at fíggja alment virksemi. Hetta er roknað til góðar 200 mió. kr. í 2008.......................................................................................................................... 39
Mynd 12. Samlaða búskaparliga árinið av uttanlandssjóinntøkunum er umleið tvífalt so stórt sum upprunaliga uttanlandssjóinntøkan. T.v.s. frá at vera ein inntøka á 320 mió. kr. eru lønirnar gjøgnum avleitt virksemi og alment virksemi økt til út við 620 mió. kr. í 2008. .................................................................................. 40
Mynd 13. Hóast beinleiðis skatturin av uttanlandsinntøkuni er sera avmarkaður, kemur rættiliga fitt inn í almennu kassarnar gjøgnum avgjøld og avleitt virksemi. Tilsamans var talan um 242 mió. kr. í 2008....... 41
Mynd 14. Tal av dønum í DIS skipanini og samlaða talið í DIS. ........................................................................... 42
Mynd 15. Tal av donskum yvirmonnum í DIS skipanini og samlaða talið av yvirmonnum í DIS. ......................... 43

### Talvur

Talva 1. Munandi fleiri føroyingar undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn sammett við aðrar tjóðir................. 33
Talva 2. Prosentsatsir aftanfyri útrokningum av samfelagsligu árinunum.......................................................... 44
Talva 3. Býtislykil av almennu útreiðslunum. ....................................................................................................... 45
Talva 4. Multiplikatorfaktorar til árin av almennu útreiðslunum......................................................................... 45

# Formæli

Í vár heitti Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið á Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning um at gera eina lýsing av ymiskum viðurskiftum hjá einum parti av føroyska arbeiðsmarknaðinum – hjá sjófólki, sum sigla í øðrum londum.

Frágreiðingin er gjørd á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning, og eru tað Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, sum hava staðið fyri frágreiðingini. Harumframt hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag saman við Maskinmeistarafelagnum sett ein bólk, sum hevur havt fylgt við arbeiðinum. Í hesum bólki hava Eyðstein Djurhuus og Páll Hansen siti. Eisini hevur Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur, veitt góða hjálp.

Teir feilir og tey lýti, ið kunnu vera í frágreiðingin eru okkara ábyrgd.

November 2009

Magni Laksáfoss og Dennis Holm

## Samandráttur

Føroysk sjófólk hava í meiri enn eina øld siglt í øðrum londum. Tey fyrstu árini serliga við føroyskum skipum, men síðan umleið 1920 hevur tað verið vanligt, at føroysk sjófólk hava siglt við útlendskum skipum. Í dag siglir ein týðandi partur av føroysku sjófólkunum við útlendskum skipum, m.a. í handilsflotanum, við fiskiskipum og í oljuvinnuni.

Tá hetta er sagt, so er tað eisini ov trongskygt at siga, at føroyski búskapurin bert hevur eitt bein, fiskivinnuna. Fleiri partar í føroysku arbeiðsmegini, serliga sjófólk, hava í meira enn eina øld verið knýttir at arbeiðsmarknaði, ið fevnir víðari enn bert tann føroyska partin. Tað ber til at siga, at kanska hevur fiskivinnan verið berandi beinið, men tann parturin av fólkinum, ið hevur verið í vinnu uttanlands, hevur verið hitt beinið, ið hevur tryggjað føroyska búskapinum framgongd og avmarkað bakkøstini í ringum tíðum.

Føroysk sjófólk, sum sigla í øðrum londum, virka undir ymiskum skipanum. Flestu sjófólkini sigla við skipum, sum eru skrásett undir donsku altjóðaskipaskrásetingini DIS. Nógv sjófólk sigla við skipum, sum eru í norsku altjóðaskipaskrásetingini, NIS. Meðan tað eisini eru føroysk sjófólk, sum sigla í eitt nú Grønlandi og Kanada. Sjófólk sum sigla undir DIS eru lønt sambært nettosáttmála, t.v.s. at tey fáa útgoldið løn, sum um tey longu høvdu rindað skattin. Hendan skipan er gjørd til fyrimuns fyri reiðaríini í DIS, sum á hendan hátt sleppa at minka um lønarkostnaðin. Í mun til DIS, so verða sjófólk í NIS lønt sambært bruttosáttmála, t.v.s. at tey rinda skatt av útgoldnu lønini. Reiðarí í NIS kunnu tó søkja um at fáa ein part av inntøkuskattinum, sum manningarnar rinda, afturgoldnan. Sjófólk í Grønlandi og Kanada sigla ikki undir altjóðaskipaskrásetingum, men verða skattaði eftir ávísari skipan.

Talið av føroyskum sjófólkum í øðrum londum hevur ligið nøkulunda støðugt um 700 tey seinastu mongu árini. Frá 2006 til 2008 er talið økt til 961. Sambært hagtølunum starvast meiri enn helmingurin undir DIS-skipanini, meðan næststørsti parturin er undir norskum skipanum. Minsti parturin er undir Grønlandi ella Kanada.

Føroysk sjófólk sigla í høvuðsheitum sum skiparar, navigatørar og maskinmeistarar. 81 prosent av øllum føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn. Næststørsti

bólkurin er dekkarar og maskinmenn, sum er umleið sjey prosent av føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini. Restin, t.v.s. 12 prosent, eru sett í øðrum størvum.

Við neyðugu fyrivarnunum fyri hagtalsgrundarlagnum ber til at geva eitt rættiliga gott boð upp á samlaðu inntøkuna frá DIS, NIS og Grønlandi og Kanada. Samlaða inntøkan er vaksin spakuliga úr umleið 140 mió. kr. í 1998 til 170 mió. kr. í 2004, t.v.s. umleið 5 mió. kr. um árið. Frá 2004 vaks inntøkan rættiliga skjótt upp í 320 mió. kr. í 2008, t.v.s. við umleið 35 mió. kr. um árið.

Hóast uttanlandsinntøkurnar ikki verða beinleiðis skattaðar í Føroyum, eru tær við til at skapa virksemi og inntøkur í føroyska samfelagnum, tí peningurin verður vanliga nýttur í Føroyum. Samlaða árinið av uttanlandsinntøkunum er tí størri, enn vit vanliga geva okkum far um. Eitt gott boð uppá árinið er, at uttanlandsinntøkurnar eru við til at skapa umleið eins stórt virksemi í føroyska samfelagnum, sum tær upprunaliga sjálvar eru. Tað vil siga at t.d. í 2008, tá uttanlandsinntøkurnar vóru umleið 320 mió. kr., hava tær skapt virksemi fyri umleið 320 mió. kr. í føroyska samfelagnum – antin beinleiðis gjøgnum vørukeyp ella óbeinleiðis gjøgnum ringárinini og almennu nýtsluna, sum er beinleiðis og óbeinleiðis fíggjað av uttanlandsinntøkunum.

## Dansk sammenfatning

Igennem mere end 100 år har færøske søfolk sejlet i andre lande. De første år primært ombord på færøske fiskeskibe, sum fiskede i fremmede farvande, men siden starten af 1920erne har færøske søfolk også i stigende grad sejlet med udenlandske skibe. I dag sejler en betydelig del af de færøske søfolk med udenlandske skibe, blandt andet i handelsflåden, med fiskeskibe og i tilknytning til olieindustrien.

Tit og ofte bliver der sagt, at den færøske økonomi kun har et ben at stå på, fiskeriet/fiskeindustrien, men denne påstand er for begrænset. Dele af den færøske arbejdskraft, specielt færøske søfolk har i mere end 100 år været tilknyttet et arbejdsmarked, som omfatter meget mere end kun den færøske del. Man kan sige, at fiskeri/fiskeindustrien måske har været det bærende ben, medens den del af befolkningen, sum har arbejdet udenlands, har været det andet ben, som har været med til at sikre den færøske økonomis fremgang og begrænse nedgangen i dårlige tider.

Færøske søfolk, som sejler i andre lande, sejler med skibe, som er registreret i forskellige skibsregistre, med forskellige forhold for blandt andet mandskab. De fleste færøske søfolk udenlands sejler med skibe, som er registreret i DIS (Dansk International Skibsregister). En del sejler med skibe i det norske internationale skibsregister, NIS (Norsk Internasjonal Skipsregister). Derudover er der også en del færøske søfolk ombord på grønlandske og canadiske skibe. Selvom færøske søfolk sejler i andre lande, findes der på Færøerne ikke registre over disse.

Søfolk, som sejler med skibe i danske DIS, er aflønnet med en nettoløn, dvs. at mandskabet er aflønnet, som om de allerede havde betalt indkomstskat. Denne ordning er etableret som en støtte til rederierne i DIS, som på denne måde har lavere lønomkostninger end under normale omstændigheder. I forhold til DIS, så er søfolk i NIS aflønnet med bruttoløn, dvs. at der betales indkomstskat af lønnen. Rederier i NIS kan dog søge om at få refunderet en del af den indkomstskat, som mandskabet betaler. Færøske søfolk i Grønland og Canada sejler ikke under internationale skibsregistre, men bliver beskattet efter en speciel ordning – i Grønland ud fra formel aftale om dobbeltbeskatning mellem Færøerne og Grønland, og i Canada ud fra

lignende principper (der er dog ikke indgået nogen formel aftale mellem Færøerne og Canada).

I perioden frem til 2006 lå antallet af færøske søfolk udenlands nogenlunde stabilt omkring 700. Fra 2006 og og frem til 2008 steg antallet til omkring 961. Over halvdelen af disse sejlede med skibe i DIS, derefter var en stor del med skibe i NIS. Medens den mindste del sejlede med grønlandske og canadiske skibe.

Færøske søfolk sejler primært som officerer, som navigations og maskinofficerer. 81 procent af alle færøske søfolk, som ”sejler” i DIS, sejler som officerer. Omkring 7 procent ”sejler” som dæks- og maskinbesætning. De resterende 12 procent er i andre stillinger.

Med nødvendige forbehold i det tilgængelige statistiske materiale er det muligt at give et godt bud på færøske søfolks samlede indkomst i DIS, NIS, og i Grønland og Canada. Den samlede indkomst steg fra omkring 140 mio. kr. i 1998 til omkring 170 mio. kr. i 2004, dvs. med omkring 5 mio. kr. om året. Fra 2004 til 2008 steg indkomsten hurtigt op til omkring 320 mio. kr., dvs. med omkring 35 mio. kr. om året (Hvis DIS indkomsten var omregnet til brutto-indkomst, havde tallene været noget større).

Selvom en stor del af disse udenlandske indkomster ikke bliver beskattet på Færøerne, er de med til at skabe øget aktivet og øget indkomst i det færøske samfund, da indkomsten normalt bliver brugt på Færøerne. Den samlede effekt af udenlandsindkomsten er derfor større, end man normalt regner med. Et godt bud er, at udenlandsindkomsten fra færøske søfolk er med til at skabe lige stor økonomisk aktivitet på Færøerne, som den oprindelige størrelse af indkomsten. Det vil sige, at der f.eks. i 2008, hvor den samlede udenlandsindkomst fra søfolk var omkring 320 mio. kr., blev skabt en økonomisk aktivitet på 320 mio. kr. i det færøske samfund – via direkte forbrug, indirekte ringvirkninger og offentligt forbrug, som er direkte og indirekte finansieret af udenlandsindkomsten.

# Inngangur

Nógvir føroyskir sjómenn sigla uttanlands, bæði sum fiskimenn, í handilsflotanum og innan frálandavinnuna. Nógvir av hesum sjómonnum eru ikki limir í føroyskum fakfeløgum, rindað ikki limagjald og eru tí heldur ikki umboðaðir av føroyskum fakfeløgum.

Teir flestu av hesum sjómonnum sigla undir sokallaðum netto-skattaskipanunum ella eru skattaðir í landinum, har teir sigla. Hóast hesir sjómenn ikki rindað skatt í Føroyum, so forvinna teir tó fitt av peningi, sum umvegis forbrúk verður settur í umferð í føroyska samfelagnum. Á hendan hátt hava hesir sjómenn týðandi ávirkan á føroyska búskapin.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag (FSN) og Maskinmeistarafelagið (MF) vil við hesari kanningini hava staðfest fleiri viðurskifti, sum hava við føroyskar sjómenn, sum sigla í øðrum londum at gera:

- Hvussu nógvir føroyskir sjómenn sigla í øðrum londum og um gjørligt hvar
- Hvussu stóra inntøkur hava hesir
- Hvussu er a) talið av sjómonnum og b) inntøkan broytt tey seinnu árini
- Hvørja ávirkan hava inntøkurnar hjá hesum sjómonnum á lands- og kommunalbúskapin

Umframt hesi viðurskifti, so hava FSN og MF eisini áhuga í at fáa lýst fleiri arbeiðsmarknaðarviðurskifti við tilknýti til føroyskar sjómenn. Hesin parturin av kanningini fevnir um eina heildarlýsing av føroyska arbeiðsmarknaðinum og týdningurin, sum føroyskir sjómenn uttanlands hava í hesum sambandi.

Endamálið við kanningini er eisini at fáa greiðari at vita, hvussu FSN og MF kunnu umboða teir nógvu føroyski sjómenninir, sum sigla uttanlands.

# 1. Arbeiðsmarknaðurin og føroysk sjófólk

Føroysk sjófólk hava í meiri enn eina øld siglt í øðrum londum. Tey fyrstu árini serliga við føroyskum skipum, men síðan umleið 1920 hevur tað verið vanligt, at føroysk sjófólk hava siglt við útlendskum skipum. Í dag siglir ein týðandi partur av føroysku sjófólkunum við útlendskum skipum, m.a. í handilsflotanum, við fiskiskipum og í oljuvinnuni.

## 1.1. Føroyskir sjómenn í øðrum londum ein aldargomul traditión

Fiskiskapur á fremmandum leiðum byrjaði longu í 19. øld. So tíðliga sum 1871 byrjaði føroyski sluppfiskiskapurin við Ísland, og stutt eftir tók útróður seg upp frá íslendskum strandabygdum. Samlaða talið á føroyingum, sum vóru virkin í fiskivinnu í Íslandi ella við Íslands strendur kundi okkurt árið tátta í túsund (Johansen 1982: 89).

Seinni – eftir 1925 – kom Grønland somuleiðis inn í myndina. Tá ið Grønlandsútróðurin var í hæddini á sumri 1962 vóru 138 fiskifør við tilsamans 647 monnum umborð (Patursson 1961 (I): 129-132). Eftir 1920 var eisini eitt vaksandi tal av fiskimonnum, sum leitaðu sær umborð á bretskar trolarar orsakað av teimum høgu hýrunum, ið vóru at fáa har. Ein føroyskur fiskimaður kundi upp á ein mánaða forvinna tað sama, sum hann vanliga fekk burturúr fyri árið umborð á føroyskari slupp, t.v.s. fyri 7 mánaðirnar (Patursson 1961 (I): 210-212). Harumframt vóru nakrir, ið fingu hýru umborð á amerikanskum, kanadiskum og newfoundlendskum trolarum, umframt umborð hjá norðmonnum, ið fiskaðu sild.

Undir kreppuni í 1950-árunum var talið á fiskimonnum við útlendskum skipum stórt. Serliga við íslendskum og norskum skipum. Hagstova Íslands upplýsir t.d. fyri árið 1957, at 1.344 føroyingar høvdu hýru umborð á íslendskum førum (Patursson 1979 (I): 338).

Skiparaskúlar hava verið í Føroyum í meira enn heila øld. Longu í 1893 fóru navnframu skiparарnir Jens Mohr og Jens í Dali undir at hava skiparaskúla í Føroyum. Aðrir komu teimum á baki og útbúgvingarnar víðkaðust og fjølgaðust. Longdin ella grønlandsprógvið, sum tað eisini varð rópt, legðist afturat, og seinni bar til at læra til skipsførara. Motorpassaraskúli varð stovnsettur sum deild undir sjómansskúlanum í 1929. Seinni bar eisini til at læra til kokk og fjarritara. Hesar útbúgvingar hava ikki bert verið ætlaðar sjómonnum

umborð á føroyskum skipum, men sum frá leið hundraðatals føroyingum í langfarasigling undir fremmandaflaggi. (Olsen 2003, bd. I og II).

Undir kreppuni fyrst í 90-árunum løgdust aðrir bólkar afturat, ið leitaðu sær út á arbeiðsmarknaðir uttan fyri Føroyar, men uttan at flyta av landinum. Serliga tók tað um seg, at føroyskir sjómenn leitaðu sær umborð á supply- og standby-skip í oljuvinnuni. Eisini tey seinnu árini hava vit sæð, at føroyingar leita sær umborð á skip úti í heimi, tá umstøður gera, at inntøkumøguleikarnir í føroyska fiskiflotanum eru lítlir.

Í so máta hevur føroysk arbeiðsmegi í fleiri enn 100 ár virkað á altjóða palli á alheims høvum, og hevur hesin parturin av arbeiðsmarknaðinum eisini havt stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Seinni í frágreiðingini verður komið meiri inn á hetta.

## 1.2. Í arbeiðsmarknaðarpolitiskum ljósi

Tað verður mangan fýlst á, at føroyski búskapurin bert hevur eitt bein, nevniliga fiskivinnuna at standa á, men spurningurin er, um ikki hetta er ov trongskygt. Rættari er at siga, at føroyski búskapurin í meira enn heila øld hevur havt tvey bein at ganga á. Vit eiga at síggja tað, sum eitt sindur misvísandi verður nevnt føroyska arbeiðsmarknaðin, í einum víðari perspektivi, enn vanligt er. Fleiri partar í føroysku arbeiðsmegini, serliga sjófólk, hava í meira enn eina øld verið knýttir at arbeiðsmarknaði, ið fevnir víðari enn bert tann føroyska partin. Tað ber til at siga, at kanska hevur fiskivinnan verið berandi beinið, men tann parturin av fólkinum, ið hevur verið í vinnu uttanlands, hevur verið hitt beinið, ið hevur tryggjað føroyska búskapinum framgongd og avmarkað bakkøstini í ringum tíðum.

Fyri at kunna tala um arbeiðsmarknaðarpolitikk er neyðugt at fyrihalda seg til arbeiðsmarknaðin, sum hann tekur seg út fyri føroysku arbeiðsmegina.

Tað ber ikki til at tala um nakran orðaðan arbeiðsmarknaðarpolitikk, heldur er talan um traditiónir og eina skapta mentan, ið hevur havt politiskar avleiðingar fyri, hvussu innlendis arbeiðsmarknaðurin er skipaður, partar formliga sum partar av einum størri donskum (og norðurlendskum) marknaði, og hvussu partar av arbeiðsmegini hava verið tilbúnir at kunna virka á einum uppaftur víðari alheims arbeiðsmarknaði.

Útbúgvingarnar hava alstóran týdning fyri, hvussu hesin veruleiki hevur tikið skap. Somuleiðis við skipanum á arbeiðsmarknaðinum við sáttmálum ímillum fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg og stovnar hoyrandi arbeiðsmarknaðinum til, so sum sum semingsstovni, lønjavningargrunni, arbeiðsloysistrygging og arbeiðsrætti. FAS, DIS og NIS hoyra til henda bólkin.

Fyri sjófólkið er tað merkisvert, at fyrstu vinnuskúlar eru sjómansskúlar við skiparaútbúgvingum, og at fyrstu feløgini á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru Færøernes Skipperforening, fyrsta lívsføra fakfelagið, stovnað 1896[1], og Færøernes Rederiforening, stovnað 1909. Fiskimannafelagið verður stovnað í 1911 og fær sáttmála við Reiðarafelagið í 1912.

Útbúgvingarnar hava gjørt tað møguligt hjá teimum sjómonnum, ið hava fingið sær útbúgving til yvirmenn, at troyta arbeiðsmøguleikar í øðrum londum. Í so máta hevur tað almenna verið við til at stovnfesta eina traditión fyri geografiskum mobiliteti.

Umframt geografiska mobilitetin hevur flytførið tvørtur um fakmørk eina drúgva traditión. Tá ið løgtingið í 1921 takkaði nei til tilboð frá danska statinum um at verða fevnt av donsku arbeiðsloysiskassaskipanini, ið var tengd at einsæris donskum fakfeløgum, forðaði tað fyri, at føroyski løntakarin varð avmarkaður innan serstøk fakmørk. (Tað er merkisvert, at tá ið Arbeiðsloysistryggingin og Arbeiðsávísingin verða stovnsett í 1992, er tað ein felags grunnur fyri allar løntakarar undir einum, har ein og hvør sum meginreglu kann verða vístur á arbeiði innan fyri eitt og hvørt fakøki.) Heilt fram til okkara tíð hevur tað verið so, at ein samanteljing av limatølunum hjá ymsu fakfeløgunum hevur givið eitt størri tal enn arbeiðsstyrkina. Mong hava verið limir í t.d. bæði Fiskimannafelagnum, arbeiðarafelagi og kanska eisini útróðrarfelagi.

[1] Ein roynd varð gjørd í 1876 at skipa arbeiðarafelag í Havn, Thorshavns Arbejderforening, men tað felagið fekk ongantíð fótafesti og datt niðurfyri.




**Mynd 1: Arbeiðsmarknaðir føroyinga. Myndin lýsir, hvussu arbeiðsmegin, búsitandi í Føroyum, er býtt upp á ymiskar arbeiðsmarknaðir, og hvussu hon stundum fer bæði um landamørk og fakmørk.**

Í eini heildarmynd hava serliga sjófólk verið tey, ið hava troytt møguleikar á ytru marknaðum, og hjá yvirmonnum við altjóða góðkendum útbúgvingum hevur tann føroyski marknaðurin í roynd og veru verið eitt slag av undirmarknaði. Samstundis hava sjófólk verið íðin at brúkt aðrar møguleikar innan onnur øki á teimum innaru marknaðunum. Aðrir bólkar hava verið ófaklærd, serliga í krepputíðum, og handverkarar, serliga í kjalarvørrinum á kreppuni fyrst í 90-árunum. Nógvir bólkar innan tað almenna hava verið nærri knýttir at einum donskum arbeiðsmarknaði, har Føroyar hava verið ein partur av tí danska. Partvíst tí at føroyingar eru danskir ríkisborgarar, partvíst tí at størsti parturin hevði útbúgving frá donskum lærustovni og partvíst tí at tey vóru limir í donskum fakfeløgum og lønt eftir donskum sáttmálum. Hetta seinna við donskum sáttmálum er miðvíst broytt síðani byrjan av 1980árunum, ikki minst eftir ynski frá føroyskum myndugleikum.

Royndirnar hava víst, at tað fyri lítið land sum Føroyar er mangt, ið talar fyri at halda fast um tær traditiónir og ta mentan, sum hava verið eitt slag av serføroyskum arbeiðsmarknaðarpolitikki, tilvitað ella ótilvitað. Bæði sæð úr einum landsbúskaparligum sjónarhorni, soleiðis sum tað er greitt frá frammanfyri, men ikki minst sum eitt hent konjunkturpolitiskt amboð. Umframt at vera annað beinið í føroyska búskapinum, so hevur tað havt alstóran týdning hjá partinum av arbeiðsmegini, sum er til avlops í rakárum, at hava møguleika at leita sær út á teir ytru marknaðirnar uttan at noyðast at flyta bústað. Tað hevur

verið ein góður máti at halda førleikarnar við líka og vanliga eisini at betra um teir og fáa nýggja vitan. Og samstundis varðveita sjálvvirði. Alternativið hevur verið at gerast arbeiðsleysur – mangan við tapi av sjálvvirði – ella at flyta av landinum. Verður hesin serføroyski arbeiðsmarknaðarpolitikkurin sleptur til frama fyri t.d. skandinaviskum fyrimyndum, so er vandi fyri at missa dýrabara arbeiðsmegi í ringum tíðum, har sveiggini hjá lítlum landi sum Føroyar við heldur eintáttaðum vinnumynstri, ofta eru harðligari enn í størri londunum.

## 2. Skipanir og umstøður hjá føroyskum sjófólkum í øðrum londum

Føroysk sjófólk sigla við skipum úr nógvum ymiskum londum kring heimin. Í Føroyum finnist tó bert skráseting av føroyskum sjófólkum, sum sigla við skipum í DIS (danska altjóða skipaskrásetingin) og DAS (Danmarks Almindelige Skibsregister (danska skipaskráseting)) og NIS (norska altjóða skipaskrásetingin) og NOR (Norges Ordinære Skipsregister (norska skipaskrásetingin)) og við grønlendskum og kanadiskum skipum.

Í hesum partinum verður greitt frá teimum skipanum, sum føroysk sjófólk sigla undir í øðrum londum.

### 2.1. Sjófólk og altjóða skipaskráseting

Seinastu gott og væl 20 árini hava fleiri lond í vesturheiminum sett á stovn altjóða skipaskrásetingar. Tann fyrsta var tann norska Norsk Internasjonal Skipsregister (NIS), sum varð sett á stovn í 1987. Sama árið varð eisini franska Kergeulen sett á stovn.. Árið eftir, í 1988, vóru líknandi skipanir settar á stovn í Danmark, DIS (Dansk International Skibsregister), og í Týsklandi GIS. Nógv føroysk sjófólk sigla við skipum, sum eru skrásett í altjóða skipaskrásetingum; men hvat er ein altjóða skipaskráseting?

#### 2.1.1. Bakgrundin fyri altjóða skipaskrásetingum

Síðan miðskeiðis í 1950-árunum hevur talið av skipum, sum eru skrásett undir hentleikaflaggi, verið vaksandi. At skip eru skrásett undir hentleikaflaggi merkir, at skip eru skrásett aðrastaðni enn í heimlandinum hjá reiðarínum. Hendan skrásetingin varð og verður vanliga gjørd fyri at sleppa undan skattum og avgjøldum, heimligum lønaravtalum, krøv til trygd o.s.fr. Panama, Liberia og Bahama eru dømi um hentleikafløgg, sum skip í øllum heiminum brúka.

Í 1960- og 1970-árunum varð roynt at forða reiðaríum í at skifta til hentleikaflagg, men uttan úrslit. Sostatt flaggaðu alsamt fleiri skip yvir til hentleikafløgg, har lógarkrøvini vóru linari. Og ikki minst bar tað til at taka umborð sjófólk úr t.d. Filipinunum, Russlandi og øðrum láglønarlondum, og løna teimum eftir lønarstøðinum í hesum londum. Á hendan hátt kundu reiðarí spara nógv í lønarútreiðslunum og soleiðis eisini vinna sær fyrimunir í kapping við onnur reiðarí (Wahl, 1999). Fyri lond, sum høvdu drúgvar traditiónir innan altjóða

skipasigling, t.d. Norra, Danmark, og Frakland, fyri at nevna nøkur, førdi útflaggingin til hentleikafløgg við sær, at ein partur av heimliga flotanum flaggaði út, samstundis sum ein munandi partur av manningini umborð varð skiftur út við manning úr t.d. Filipinunum. Við øðrum orðum var ein týdningarmikil vinna og vinnuvegur í vanda fyri at detta burtur.

Fyri at steðga útflaggingini av stórum pørtum av flotanum og fyri at forða fyri at missa stórt tal av siglandi fólki, hava fleiri lond í vesturheiminum síðan síðst í 1980-árunum sett á stovn altjóða skipaskrásetingar. Endamálið við hesum altjóða skipaskrásetingum var og er at forða fyri, at skip flagga út og skifta til hentleikafløgg, hetta við at geva reiðaríum nakrir av somu fyrimunum, sum tey fáa, um tey sigla undir hentleikaflaggi. Reiðarí hava í hesum sambandi til dømis fingið skattafyrimunir og loyvi at brúka arbeiðsmegi úr øðrum londum undir teirra lønarsáttmálum (t.d. filipinarar, sum verða løntir eftir Filipinskum lønarstøði).

Kanningar vísa, at summar av altjóða skipaskrásetingunum í ávísan mun hava megnað at steðga útflaggingini til hentleikafløgg og fingið skip í aftur heimliga flotan. Hetta hevur t.d. verið galdandi fyri tað danska DIS og tað norska NIS. Í øðrum førum hevur tað ikki havt stóra ávirkan á útflaggingina av skipum, t.d. hevur hetta verið støðan í Fraklandi (Økonomi- og erhvervsministerens, 2004).

Sum nevnt sigla nógvir føroyingar við skipum, sum eru skrásett í altjóða skipaskrásetingum. Teir flestu sigla við skipum, sum eru skrásett í tí danska DIS, meðan nógvir eisini sigla við skipum, sum eru skrásett í tí norska NIS. Men hvat er DIS og NIS?

### 2.1.2. Dansk International Skibsregister (DIS)

Dansk International Skibsregister (hereftir DIS[2]) varð stovnað í 1988. Endamálið við DIS var og er at tryggja kappingarføri hjá danska flotanum, sum siglir í altjóða sigling, soleiðis at donsk skip framhaldandi velja at sigla undir donskum flaggi (Søfartsstyrelsen (www.dma.dk)).

[2] Í Danmark eru tvær skipaskrásetingar, altjóðaskipaskrásetingin DIS (Dansk International Skibsregister) og vanliga skipaskrásetingin DAS (Danmarks Almindelige Skibsregister).

*Alment um DIS*

Handils- og ferðafólkaskip, sum eru 20 bruttotons ella størri, kunnu gerast partur av DIS. Tó kunnu ferðafólkaskip, sum flyta ferðafólk millum danskar havnir, ikki gerast partur av DIS (Søfartsstyrelsen (www.dma.dk)). Skip, sum sigla undir DIS, skulu sigla undir donskum flaggi og eru eisini undirløgd donsku rættarskipanini.

Sum útgangspunkt skulu skipini í DIS verða donsk skip, t.v.s. at skipini skulu hava danskar eigarar. Men skip, sum eru heimahoyrandi í ES, kunnu tó eisini gerast partur av DIS, hetta samsvarandi ES reglunum um rættindunum til frítt at stovnseta fyritøkur og flyta arbeiðsmegi og tænastuveitingar innan ES limalondini. Onnur skip, sum hava útlendskar eigarar, kunnu tó gerast partur av DIS, um so er, at danir eiga ein munandi part í felagnum. Harumframt eru eisini onnur serlig frávik í regluni um, at bert donsk skip kunnu gerast partur av DIS.

*Krøv til trygd og rættindi*

Øll skip, sum sigla undir DIS, skulu lúka krøvini frá danska Søfartsstyrelsen um trygd, varðveitan av havumhvørvinum, arbeiðsumhvørvi, sosial rættindi v.m. Søfartsstyrelsen ásetur eisini, hvussu stór manningin skal vera umborð á skipum, sum eru partur av DIS. Harumframt er eisini krav um, at skipsførarin er danskur statsborgari.

*Lønar- og sáttmálaviðurskifti*

Sambært ES reglum kunnu limalondini í ES veita stuðul til flotan fyri at tryggja kappingarføri hjá evropeiska flotanum. Hesar reglur loyva limalondunum at frítaka sjófólki fyri persónsskatti og harumframt, at reiðarí verða frítikin fyri partafelagsskatti, sum er grundaður á rakstrarliga avlopi hjá reiðarínum, og ístaðin verða skattaði í mun til støddina (tonnage) av skipinum. DIS skipanin fevnir bert um frítøkuna av skatting av sjófólki og er tað í DIS skipanini innbygt, at sjófólk fáa nettoløn. Hetta merkir, at sjófólk, sum sigla við skipum, íð eru skrásett í DIS, fáa útgoldið løn, sum um tey longu høvdu rindað skattin – og fáa reiðaríini í DIS á tann hátt ein fyrimun frá danska statinum.

DIS loyvir harumframt, at tann parturin av manningini, sum ikki hevur fastan bústað í danska ríkinum, kann verða løntur sambært sáttmálum við fakfeløg í heimlandinum hjá manningini (t.d. at filipinarar kunnu verða løntir sambært sáttmálum í Filipinunum). Krøv um hvíld, sosial

rættindi, frítið o.s.fr. eru sambært donsku sjómanslógini og lóg um arbeiðsskaðaendurgjald, og hava sjófólk, sum ikki eru danskir statsborgarar, eisini rætt til fimm vikur frítíð við løn.

Yvirmenn umborð á skipum, sum sigla undir DIS, eru tryggjaðir gjøgnum sáttmálar millum avvarðandi donsk fakfeløg og danska reiðarafelagið. Í hesum sáttmálum er ásett minstuløn umframt onnur vanlig rættindi, eins og vit kenna tað frá føroyskum sáttmálum, t.d. viðvíkjandi pensjónsskipan, arbeiðstíð, frítíð, barnsburðarfarloyvi, sjúkrafarloyvi o.s.fr. (Overenskomst mellem Danmarks rederiforening og Søfartens Ledere 1. april 2007 – 1. april 2010).

Leggjast kann afturat, at ásannandi at tali av donskum sjófólkum er í minking, er í DIS-høvuðsavtaluni álagt reiðaríum at virka fyri danskari starvssetan í flotanum, sum siglir undir DIS. Hetta fyri at varðveita og menna "maritime know how i Danmark" (DIS-Hovedaftale, 2005).

### 2.1.3. Norsk Internasjonal Skipsregister (NIS)

Norsk Internasjonal Skipsregister (hereftir NIS[3]) varð stovnað í 1987 og var sum nevnt tann fyrsta altjóða skipaskrásetingin. NIS varð, eins og DIS, stovnað fyri at forða fyri, at fleiri norsk skip flaggaðu um til hentleikafløgg, og somuleiðis eisini fyri at tryggja norsk arbeiðspláss umborð á norskum skipum og arbeiðspláss við tilknýti til norsk skip (Skibsregistrene www.nis-nor.no).

*Alment um NIS*

Ferðafólkaskip, farmaskip og harumframt luftpútuskip og boripallar kunnu skrásetast í NIS. Fiskiskip kunnu ikki skrásetast í NIS. Skip, sum sigla við ferðafólki ella farmi millum norskar havnir, kunnu heldur ikki skrásetast í NIS.

Skip undir NIS sigla undir norskum flaggi og eru undirløgd norska rættarskipan, og eru norsku sjófartsreglurnar eisini galdandi fyri skip, sum eru skrásett undir NIS (tó undantøk eru).

[3] Í Norra eru eisini tvær skipaskrásetingar, altjóðaskipaskrásetingin NIS og vanliga skipaskrásetingin NOR (Norges Ordinære Skipsregister).

Tað eru ikki krøv um, at skipini í NIS skulu vera norsk, men útlendsk reiðarí skulu tó hava høvuðsskrivstovu í Norra og/ella umboðsfólk í Norra (Skibsregistrene www.nis-nor.no).

*Krøv til trygd og rættindi*

Norra hevur viðurkent tær grundleggjandi altjóða avtalurnar um trygd á sjónum, varðveitan av havumhvørvinum (SOLAS og MARPOL) og ILO-avtalurnar um arbeiðsumstøður, sosial rættindi v.m., og eru hesar eisini galdandi fyri skip, sum eru skrásett undir NIS (Skibsregistrene www.nis-nor.no).

*Lønar- og sáttmálaviðurskifti*

Í mun til DIS skipanina, har sjófólk ikki rinda skatt – eru lønt sambært nettosáttmála – so rinda sjófólk, sum sigla við skipum, ið eru skrásett undir NIS, skatt til norska statin – eru lønt sambært bruttosáttmála. Skatturin, sum sjófólk rinda, er millum 30 og 40 prosent. Sjófólk hava tó eisini ein sjómannafrádrátt á 30 prosent, sum tó í mesta lagi kann vera 80.000 NKR um árið (www.skatteetaten.no).

Umframt skatt av inntøkuni, so rinda sjófólk, sum sigla undir NIS, eisini avgjald til Folketrygd, sum er 7,8 prosent (www.skatteetaten.no). Øll, sum eru limir í Folketrygd og rinda avgjald til Folketrygd (eisini sjófólk, sum sigla við skipum í NIS), hava rættindi til veitingar í Folketrygdeloven (www.offshoreforeningen.no).

**Um Folketrygd**

Folketrygdens formål er å gi økonomisk trygghet ved å sikre inntekt og kompensere for særlige utgifter ved arbeidsløshet, svangerskap og fødsel, aleneomsorg for barn, sykdom og skade, uførhet, alderdom og dødsfall.

Folketrygden skal bidra til utjevning av inntekt og levekår over den enkeltes livsløp og mellom grupper av personer.

Folketrygden skal bidra til hjelp til selvhjelp med sikte på at den enkelte skal kunne forsørge seg selv og klare seg selv best mulig til daglig.

*Kelda: Lov om Folketrygd*

Í mun til DIS skipanina, har reiðarí kunnu rinda út nettoløn, so verður í NIS skipanini útgoldin bruttoløn (t.v.s. skattur verður goldin av lønini), men kunnu reiðarí, sum eru í NIS, søkja norska statin um at fáa eitt endurgjald í mun til útgoldnu lønina. Endurgjaldið til reiðaríið er

antin 9,3 % (fyri t.d. skip, sum sigla innan oljuvinnuna) ella 12% (fyri skip, sum ikki eru innan oljuvinnuna) (kpmg.no). Í 2008, galdandi frá 1. juli 2008, varð ein avmarking ásett, soleiðis at endurgjald bert fæst fyri tann partin av ársinntøkuni, sum er undir 500.000 NKR. Harumframt kann endurgjaldið fyri tann einstaka lønmóttakarin (persónin) í mesta lagi verða 198.000 NKR um árið.

**Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin, FAS**

Seinasta árið hevur verið gjørt nógv burtur úr at fáa reiðarí, føroysk og útlendsk, at skráseta seg í føroysku altjóða skipaskrásetingini, FAS. Føroysk sjófólk, sum sigla við skipum í FAS, verða lønt eftir nettosáttmála, t.v.s. at tey eru fult skattskyldug í Føroyum. Skatturin er pr. 1. januar 2009 35 prosent.

Umframt fulla skattskyldu, so skulu føroyingar, sum sigla við skipum í FAS, eisini rinda arbeiðsmarknaðargjald, arbeiðsloysisgjald og barsilsgjald. Útlendingar, sum sigla undir FAS, skulu ikki gjalda hesi gjøld.

Reiðarí, sum hava skip skrásett í FAS, hava rætt til at fáa afturgoldið allan inntøkuskattin, sum manningar rinda.

Í september 2009 vóru 38 skip skrásett í FAS. Talan er bæði um føroysk og útlendsk skip.

*Keldur: www.fas.fo, Spekt, 7. mars 2008*

## 2.2. Tvískattaskipanir

Umframt at føroyingar sigla við skipum, sum eru skrásett í altjóða skipaskrásetingum í Danmark og Norra, so sigla nógvir føroyingar í Grønlandi og nakrir føroyingar í Kanada.

Fyri at sleppa undan, at føroyingar, sum sigla í Grønlandi, bæði rinda skatt í Grønlandi og í Føroyum – fyri at gera umstøðurnar hjá føroyingum, sum sigla í Grønlandi, so lagaligar, sum gjørligt – er gjørd avtala um tvískattaskipan millum Føroyar og Grønland. Hendan skipan verður umrødd niðanfyri.

Ongin avtala er um tvískattaskipan millum Føroyar og Kanada, men á TAKS verður víst á, at ein skipan er, sum ger, at føroyingar, sum sigla í Kanada og rinda skatt har, ikki verða skattaðir dupult (meiri um hetta niðanfyri).

### 2.2.1. Føroyingar, sum sigla við grønlendskum skipum

Í november 2000 gjørdu Føroya Landsstýri og Grønlendska Landsstýri avtalu um tvískattasáttmála millum Føroyar og Grønland. Endamálið við hesum sáttmála er, at sleppast skal undan tvískatting av inntøku og ogn – t.d. at føroyingur, sum arbeiðir í Grønlandi ikki skal skattast bæði í Grønlandi og í Føroyum (Tvískattasáttmáli millum Føroyar og Grønland).

Í avtaluni verður skilt millum, um ein persónur er búsitandi í Føroyum ella í Grønlandi og verður skattingin so gjørd út frá tí. Í avtaluni er eisini ásett, nær ein persónur verður mettur at búgva í Føroyum ella Grønlandi.

Fyri føroysk sjófólk, sum eru búsitandi í Føroyum og sigla við grønlendskum skipum, førir hendan avtala við sær, at um tey bara hava inntøku frá grønlendskum skipum (og ikki hava inntøku í Føroyum, meðan tey eru heima í frítíð), so rinda tey bert skatt í Grønlandi (inntøkan verður tó uppgivin á føroysku sjálvuppgávuni). Umframt hetta rinda tey AM-gjald (gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin) í Føroyum (Spekt, 2007 (fyri Maskinmeistarafelagið)) [4].

Um føroysk sjófólk, sum eru búsitandi í Føroyum og sigla í Grønlandi, eisini hava inntøku í Føroyum, tá tey eru heima í frítíð, so verður føroyska inntøkan skattað við tí skattaprosenti, sum samlaða inntøkan skuldi verðið skatta við í Føroyum. Niðanfyri eru dømi um skatting við einans grønlendskari inntøku og við føroyskari og grønlendskari inntøku (Spekt, 2007 (fyri Maskinmeistarafelagið)).

[4] Útrokningarnar eru gjørdar av Spekt í 2007 fyri Maskinmeistarafelagið.

**Dømi við einans grønlendskari inntøku**

| | |
|---|---|
| Føroysk inntøka | 0 kr. |
| Grønlendsk inntøka | 500.000 kr. |
| Skattskyldug inntøka í Føroyum | 500.000 kr. |
| Skattur av 500.000 kr. | 221.700 kr. |
| Frádráttur í skatti (500.000 / 500.000 * 221.700) | 221.700 kr. |
| Skattur í Føroyum aftaná frádrátt (221.700-221.700) | 0 kr. |
| AM-gjald (1,5 % * 500.000) | 7.500 kr. |
| Skattur og AM-gjald í Føroyum tilsamans | 7.500 kr. |

**Dømi við føroyskari og grønlendskari inntøku**

| | |
|---|---|
| Føroysk inntøka | 100.000 kr. |
| Grønlendsk inntøka | 400.000 kr. |
| Skattskyldug inntøka í Føroyum | 500.000 kr. |
| Skattur av 500.000 kr. | 221.700 kr. |
| Frádráttur í skatti (400.000 / 500.000 * 221.700) | 177.360 kr. |
| Skattur í Føroyum aftaná frádrátt (221.700-177.360) | 44.340 kr. |
| AM-gjald (1,5 % * 500.000) | 7.500 kr. |
| Skattur og AM-gjald í Føroyum tilsamans | 51.840 kr. |

Av tí, at inntøkan frá grønlendskum skipum ikki verður roknað sum A-inntøka í Føroyum, so hava føroysk sjófólk, búsitandi í Føroyum, sum sigla við grønlendskum skipum, ikki skyldu at gjalda ALS gjald ella gjald til barsilsskipanina. Men hesi sjófólk kunnu tó sjálvboðið rinda ALS gjald og gjald til barsilsskipanina og á tann hátt eisini fáa rætt til útgjald eftir hesum skipanum (persónar, sum sjálvboðið hava goldið ALS-gjald í samhangandi eitt ár, hava rætt til útgjald úr skipanini).

Føroyingar, sum sigla við grønlendskum skipum, hava rætt til sama frádrátt í skattinum, sum føroyskir fiskimenn, sokallaða sjómannafrádráttin. Men frádrátturin verður tó bert givin í grønlendsku inntøkuni, og hevur tískil ikki ta stóru ávirkan á føroyska skattin, tí grønlendska inntøkan verður ikki skattað í Føroyum.

### 2.2.2. Føroyingar, sum sigla í Kanda

Føroyingar, sum sigla í Kanada, antin tað er við fiskiskipum ella øðrum skipum, eru fult skattskyldugir í Føroyum. Tað vil siga, at øll inntøkan skal gevast upp í Føroyum. Um so er, at persónur hevur goldið skatt í Kanada, so kann hesin skattur trekkjast frá í Føroyum. Við øðrum orðum, um skatturin í Kanada er lægri enn hann hevði verið í Føroyum, so rindar tú munin, men um nú persónur hevur goldið meiri í skatt í Kanada, enn hann hevði gjørt í Føroyum, so verður munur tó ikki útgoldin (TAKS, September 2009).

## 3. Føroysk sjófólk í øðrum londum og árin á búskapin

Í hesum partinum verður givin ein lýsing av, í hvørjum londum og undir hvørjum skipanum føroysk sjófólk starvast, og hvussu mynstrið er broytt seinastu árini. Víst verður á, at føroysk sjófólk í høvuðsheitum starva undir donsku DIS-skipanini. Í øðrum lagi starvast nógv undir norsku NIS-skipanini meðan onnur sigla við skipum undir Grønlandi og Kanada. Harumframt verður staðfest, út frá hagtølum úr DIS-skipanini, at flestu teirra starvast sum yvirmenn, meðan einans ein minni partur starvast sum dekkarar o.a.

### 3.1. Føroysk sjófólk í øðrum londum í 2008

Lýsingin av føroyskum sjófólkum í øðrum londum er grundað á tøl hjá TAKS. Tølini skulu takast við tí fyrivarni, at talan er um árstøl út frá skattatskipanini, t.v.s. at øll sjófólk eru tald við, óansæð um tey einans hava siglt ein part av árinum við útlendskum skipum. Tað hevði uttan iva verið rættari at havt hagtøl yvir fulltíðarstørv ella annað líknandi, men hesi eru tíverri ikki tøk. Eitt meiri nágreiniligt boð upp á veruliga talið av føroyskum sjófólkum í øðrum londum verður givið á síðu 29.




**Mynd 2. Føroysk sjófólk í øðrum londum í 2008. Meiri enn helmingurin av føroyskum sjófólkum í øðrum londum arbeiða undir DIS-skipanini. Triðingurin er undir NIS-skipanini, meðan restin siglir undir Grønlandi og Kanada.**
Kelda: TAKS og metingar.

Tilsamans vóru 961 sjófólk skrásett í øðrum londum í 2008. Harav vóru 512 undir DIS-skipanini, 299 undir NIS-skipanini og 150 í Grønlandi og Kanada. Her eigur at vera viðmerkt, at tølini fyri DIS og NIS eru rættiliga álítandi, meðan tølini fyri Grønland og Kanada eru leysligar metingar út frá TAKS-skipanini. Tað finnast ikki skrásetingar av føroyskum sjófólkum undir øðrum skipanum enn DIS og NIS og annars í øðrum londum enn Grønlandi og Kanada.

Meiri enn helmingurin av føroyskum sjófólkum í øðrum londum starvast sambært hagtølunum undir DIS-skipanini, meðan næststørsti parturin er undir norskum skipanum. Minsti parturin er undir Grønlandi ella Kanada.

## 3.2. Føroysk sjófólk í øðrum londum, 1998-2008

Talið av føroyskum sjófólkum í øðrum londum hevur verið nøkulunda støðugt um 700 tey seinastu nógvu árini. Í 2006, 2007 og 2008 er talið tó hækkað til næstan 1.000. Mynstrið millum londini er eisini broytt nakað. Í 2001 vóru umleið tveir triðingar av føroysku sjófólkunum undir DIS-skipanini, 20 prosent undir Grønlandi og Kanada og 16 prosent undir NIS-skipanini. Í 2008 er býtið øðrvísi við tað, at lutfalsliga færri eru undir DIS, meðan fleiri eru undir NIS. Sum heild hevur býtið tó verið nøkulunda støðugt. Flest sjófólk hava verið undir DIS, og restin hevur býtt seg nøkulunda javnt millum NIS og Grønland og Kanada.




**Mynd 3. Føroysk sjófólk í øðrum londum, 1998-2008. Talið av sjólki hevur ligið um 700, men er í 2008 vaksið til næstan 1.000.**
Kelda: TAKS og metingar.

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| DIS, Dansk Internationalt Skibsregister | 388 | 417 | 464 | 475 | 436 | 394 | 379 | 394 | 432 | 446 | 512 |
| NIS, Norsk Internasjonalt Skipsregister, farmaskip og oljuvinna | 176 | 190 | 121 | 116 | 144 | 145 | 157 | 182 | 187 | 226 | 299 |
| Grønland og Kanada | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| **Tilsamans** | **714** | **757** | **735** | **741** | **730** | **689** | **686** | **726** | **769** | **822** | **961** |

Fyri at fáa eina betri mynd av gongdini seinastu árini innan DIS, NIS og Grønland og Kanada, verður hugt eitt sindur nærri eftir einstøku bólkunum.

## 3.3. Føroysk sjófólk í DIS

Umframt at fevna um Dansk Internationalt Skibsregister (DIS) fevnir uppgerðin eisini um Danmarks Almindelige Skibsregister (DAS). Nógv tey flestu sjófólkini eru undir DIS-skipanini – einans lítil partur er undir DAS. Í restini av frágreiðingini verður ikki skilt millum DIS og DAS, men alt verður kallað DIS.

**Hvat er rætta talið av DIS-sjófólkum: Ein samanbering av hagtølum frá TAKS og frá Søfartsstyrelsen**

30. september 2008 vórðu 319 føroysk sjófólk mynstraði undir DIS-skipanini sambært hagtølum frá Søfartsstyrelsen. Roknast má við, at nøkur sjófólk til eina og hvørja tíð eru avmynstraði vegna sjúku, frítíð ella annað, og tí framhaldandi mugu roknast fyri at hava sítt høvuðsstarv innan sjóvinnu. Harvið má roknast við, at talið 319 hjá Søfartsstyrelsen er nakað lægri enn veruliga talið í 2008.

Talið hjá TAKS fyri alt árið 2008 var 512. Øll sjófólk eru tald við í tølunum frá TAKS, óansæð um tey einans hava siglt ein part av árinum við útlendskum skipum. Roknast má tí við, at veruliga talið nokk er nakað lægri enn 512 í 2007.

Samanumtikið kundi ein meting verið, at talið í 2008 liggur um 450-500 fulltíðarstørv innan DIS-skipanina.

Út frá samanberingini av tølunum frá Søfartsstyrelsen og TAKS sæst, at tølini hjá TAKS mugu metast sum rættiliga rættvísandi við tað, at TAKS-talið má metast sum størst møguliga talið, samstundis sum rætta talið av fulltíðarstørvum neyvan er meiri enn 10 prosent lægri enn TAKS-talið. Gongdin í TAKS-tølunum má tí metast at geva eina góða ábending av gongdini í samlaða talinum av føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini.




**Mynd 4. Talið av føroyskum sjófólkum, sum sigla undir DIS, hevur ligið nøkulunda støðugt um 400 til 450. Í 2008 er talið komið upp á 512.**
Kelda: TAKS.

Út frá TAKS-tølunum fæst ein mynd av gongdini frá 1997 til 2008. Talan er um eina javna gongd, har talið hevur ligið millum sløk 400 til góð 450 øll árini. Einasta undantakið hevur

verið, at í 2008 vaks talið upp á 512 Talið vaks fyrst úr 388 í 1998 til 475 í 2001. Síðan fall tað niður í 379 í 2004 fyri síðan at vaksa til 446 í 2007 og 512 í 2008.

## 3.4. Føroysk sjófólk í NIS

Uppgerðin yvir NIS fevnir um føroysk sjófólk undir norsku altjóða skipaskránni, NIS, og um sjófólk við farmaskipum og í oljuvinnuni. Hagtølini eru fingin til vega úr TAKS-skránni. Upplýst er frá TAKS, at nógv tann størsti parturin eru fólk í oljuvinnuni.




**Mynd 5. Talið av føroyskum sjófólki, sum sigla undir NIS, er vaksið mundandi síðan 2001.**
Kelda: TAKS.

Meðan “DIS’arnir” vaksa í tali fram til 2001 fyri síðan at falla, er gongdin beint øvugt fyri “NIS’-arnar”. Møguliga er talan um eina ávísa flyting millum bólkarnar, soleiðis at sjófólk eru flutt úr NIS inn í DIS fram til 2001, fyri síðan at flyta úr DIS inn í NIS frá 2001 til 2004. Eftir 2004 er tó talan um vøkstur í báðum bólkum. Hetta var samstundis sum afturgongd var í føroyska búskapinum, fyrst og fremst tí at støðan í alivinnuni og rækjuvinnuni var ikki góð. Møguliga fluttu fólk av somu orsøk til DIS og NIS fyri at arbeiða.

Vøksturin í talinum av DIS’arum og NIS’arum frá 2004 til 2007 er nøkulunda tann sami, nevniliga umleið 75 í hvørjum bólki. Frá 2007 til 2008 er vøksturin eisini nøkulunda ájavnur, umleið 70 í hvørjum bólki. Av tí at NIS’-arnir eru færri í tali er lutfalsligi vøksturin tó nakað væl størri í hesum bólkinum.

## 3.5. Føroysk sjófólk í Grønlandi og Kanada

Frá TAKS er upplýst, at talið av sjófólkum í Grønlandi liggur millum 50 og 100, og í Kanada liggur talið um 20. Av tí, at nøkur sjófólk av skattligum orsøkum lata seg skráseta við c/o-adressu í Grønlandi og tí ikki koma undir TAKS-skipanina, er mett, at samlaða talið av føroyskum sjófólkum í Grønlandi og Kanada liggur um 150.

Roynd er gjørd at fáa hendur á neyvari tali av føroyskum sjófólkum í Grønlandi og at lýsa gongdina seinastu árini, men tað hevur ikki eydnast at fáa neyvari tøl. Tó er samlaða talið av útlendskum sjófólkum í Grønlandi tøkt, og av tí at stórur partur av útlendskum sjófólkum í Grønlandi eru føroysk sjófólk, kann hetta geva eina ábending av gongdini.




**Mynd 6. Útlendsk sjófólk í Grønlandi. Stórur partur av útlendskum sjófólki í Grønlandi eru føroyingar.**
Kelda: Grønlands Statistik.

Skrásetingin av útlendskum sjófólkum er gjørd út frá, hvar ein er føddur, t.v.s. talið av persónum í bólkinum “fiskere” og “født udenfor Grønland”. Í tíðarskeiðinum 1996 til 2006 hevur talið ligið millum 200 og 300. Flestu árini hevur talið ligið um 200, meðan árini 2001, 2002 og 2003 lá talið um 300.

Metingin hjá TAKS á millum 50 og 100 tykist tískil at vera nøkulunda eftirfarandi. Talið er í øllum førum ikki nógv størri enn 100, við tað at samlaða talið av útlendskum sjófólkum í grønlendska flotanum liggur um 200.

## 3.6. Føroyingar sigla sum yvirmenn

Út frá uppgerð hjá Søfartsstyrelsen ber til at fáa eina mynd av, hvørji størv føroysku sjófólkini hava umborð á skipum undir DIS-skipanini, og harvið eina rættiliga góða ábending av størvunum umborð á útlendskum skipum.

Yvirlitið er frá 30. september 2008 og er tað hugsandi, at føroysk sjófólk í øðrum londum hava á leið sama starvsbýti.. Ilt er tó at siga, um mynstrið er broytt seinastu árini, ella um sama mynstrið eisini var galdandi fyri t.d. 10 árum síðani.




**Mynd 7. Føroysk sjófólk í DIS-skipanini. Flestu føroyingar undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn.**
Kelda: Hagtøl úr DIS-skipanini pr. 30. september 2008.

Føroysk sjófólk sigla í høvuðsheitum sum skiparar, navigatørar og maskinmeistarar. 81 prosent av øllum føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn. Næststørsti bólkurin er dekkarar og maskinmenn, sum er umleið sjey prosent av føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini. Restin, t.v.s. 12 prosent, hava onnur størv. Mynstrið er sostatt rættiliga greitt, við tað at nógv tann størsti parturin av føroysku sjófólkunum umborð á útlendskum skipum sigla sum yvirmenn.

| | Navigatørar og maskinmeistarir | Dekkarir og maskinfólk | Onnur í tænastu | Ikki í tænastu | Onnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Danmark** | 2.804 | 1.424 | 891 | 74 | 472 | **5.665** |
| **Philippinerne** | 413 | 1.271 | 680 | 36 | 109 | **2.509** |
| **India** | 274 | 362 | 110 | 22 | 21 | **789** |
| **Póland** | 136 | 275 | 187 | 7 | 6 | **611** |
| **Føroyar** | 261 | 21 | 12 | 5 | 20 | **319** |
| **Thailand** | 0 | 1 | 201 | 1 | 0 | **203** |
| **Ukraina** | 115 | 64 | 12 | 0 | 10 | **201** |
| **Letland** | 56 | 54 | 36 | 0 | 3 | **149** |
| **Svøríki** | 22 | 19 | 80 | 7 | 1 | **129** |
| **Russland** | 65 | 33 | 10 | 3 | 3 | **114** |
| | | | | | | |
| **Tilsamans** | **4.146** | **3.524** | **2.219** | **155** | **645** | **10.689** |

**Talva 1. Munandi fleiri føroyingar undir DIS-skipanini sigla sum yvirmenn sammett við aðrar tjóðir.**
Kelda: Hagtøl úr DIS-skipanini pr. 30. september 2008.

Ein spurningur kundi verið, um sama mynstrið er galdandi fyri aðrar tjóðir undir DIS-skipanini. Umleið helmingurin av dønum sigla sum yvirmenn undir DIS-skipanini, meðan minni parturin av filipinum, indarum og pólendingum sigla sum yvirmenn. Føroyska mynstrið er sostatt rættiliga serstakt, við tað at lutfalsliga nógv størri partur av føroysku sjófólkunum sigla sum yvirmenn.

# 4. Inntøkan hjá føroyskum sjófólkum í øðrum londum

Hóast hagtalsgrundarlagið ikki er av tí besta, er gjørligt at fáa eina rættiliga góða hóming av bæði miðalinntøkuni og samlaðu inntøkuni hjá sjófólki okkara í øðrum londum. Miðalinntøkan hevur verið støðugt vaksandi og serliga er tað inntøkan undir norsku NIS-skipanini, sum er vaksin rættiliga fitt frá 1998 til 2008. Eitt gott boð upp á eina miðalinntøku í 2008 liggur um kr. 400.000. Samlaða inntøkan er eisini vaksin, serliga eftir 2004. Samlaða inntøkan lá í 2007 um 260 mió. kr. Um hædd hevði verið tikin fyri, at DIS-skipanin er ein nettoskattaskipan, hevði samlaða inntøkan verið nakað hægri enn 260 mió. kr.

## 4.1. Miðalinntøkan hjá sjómonnum í øðrum londum

Út frá hagtølum frá TAKS og Grønlands Statistik er møguligt at fáa eina hóming av miðalinntøkuni hjá føroyskum sjófólki undir DIS, NIS og Grønlandi. Tað er ikki gjørligt beinleiðis at samanbera miðalinntøkurnar, m.a. tí at grønlendsku hagtølini eru umroknað til fulltíðarstørv og harvið ikki eru sambærlig við TAKS-tølini, ið, sum áður nevnt, hava allar inntøkur við, hóast hesar einans eru vunnar part av árinum. Ein onnur orsøk er, at inntøkurnar undir DIS-skipanini eru 'netto-inntøkur', t.v.s. reiðaríið hevur afturhildið tann partin, sum annars hevði farið til skattingar. Harafturímóti er NIS-skipanin eins og grønlendska skipanin ein brutto-skipan, t.v.s. at inntøkurnar eru áðrenn skatt.




**Mynd 8. Miðalinntøkan hjá sjófólki undir NIS og DIS og undir Grønlandi.**
Kelda: Hagtøl úr TAKS, Grønlands Statistik og metingar.

Hóast stóru trupulleikarnir í hagtølunum ber til at fáa eina hóming av inntøkunum hjá føroyskum sjófólki í fremmandum londum. Verður DIS-inntøkan, sum liggur um kr. 300.000 netto í 2008, umroknað til bruttoinntøku vil hon liggja nakað omanfyri kr. 400.000. Hetta er nakað sama støðið, sum miðal-inntøkurnar undir Grønlandi og undir NIS-skipanini.

Við øllum neyðugum fyrivarni fyri ymiskum uppgerðarhættum og skattaskipanum er tað nógv, sum bendir á, at kr. 400.000 er eitt gott boð upp á eina miðal ársinntøku fyri skatt hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum í 2008.

## 4.2. Samlaða inntøkan hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum

Ein uppgerð av samlaðu inntøkuni hevur stórt sæð somu fyrivarni sum omanfyri, nevniliga at DIS-skipanin er ein netto-skattaskipan og vísur inntøkuna "eftir skatt", meðan grønlendsku inntøkurnar og inntøkurnar undir NIS-skipanini eru bruttoskattaskipanir og vísa inntøkuna fyri skatt. Tað er tí ikki gjørligt beinleiðis at samanbera hesar inntøkurnar.




**Mynd 9. Samlaða inntøkan hjá føroyskum sjófólki í øðrum londum.**
Kelda: TAKS

Við neyðugu fyrivarnunum fyri hagtalsgrundarlagnum ber tó til at geva eitt rættiliga gott boð upp á samlaðu inntøkuna frá DIS, NIS og Grønlandi og Kanada. Samlaða inntøkan er vaksin spakuliga úr umleið 140 mió. kr. í 1998 til 170 mió. kr. í 2004, t.v.s. umleið 5 mió. kr. um

árið. Frá 2004 vaks inntøkan rættiliga skjótt upp í 320 mió. kr. í 2008, t.v.s. við umleið 35 mió. kr. um árið. Her skal havast í huga, at hevði DIS-inntøkan verið roknað um til eina brutto-inntøku, høvdu tølini verið nakað størri.

Vøksturin frá 2004 til 2008 stavar frá øllum trimum inntøkubólkum. Serliga stórur er vøksturin í NIS-inntøkunum, sum eru tvífaldaðar frá 2004 til 2008.

## 5. Inntøkan skapar umfar í føroyska búskapinum

Hóast uttanlandsinntøkurnar ikki verða beinleiðis skattaðar í Føroyum, eru tær við til at skapa virksemi og inntøkur í føroyska samfelagnum, tí peningurin verður vanliga nýttur í Føroyum. Uttanlandsinntøkurnar eru hervið við til at skapa byggivirksemi, eftirspurning eftir tænastum, bilakeyp, umframt vanligt keyp av nýtsluvørum. Umframt at nýtslan av peninginum verður skattað gjøgnum MVG'ið, skrásetingargjøld o.a. eru uttanlandsinntøkurnar eisini við til at skapa lønarkrónur í øðrum vinnum, og eru tær harvið eisini við til at geva landinum og kommununum skattainntøkur.

Skatta- og avgjaldsinntøkurnar frá uttanlandsinntøkunum verða nýttar til almennar lønir, løgur og nýtslu, og eru á henda hátt aftur við til at skapa virksemi í samfelagnum.

Samlaða árinið av uttanlandsinntøkunum er tí størri, enn vit vanliga geva okkum far um. Eitt gott boð uppá árinið er, at uttanlandsinntøkurnar eru við til at skapa umleið eins stórt virksemi í føroyska samfelagnum sum tær upprunaliga sjálvar eru. Tað vil siga, at t.d. í 2008, tá uttanlandsinntøkurnar vóru umleið 320 mió. kr., hava tær í sama árið skapt virksemi fyri umleið 320 mió. kr. í føroyska samfelagnum – antin beinleiðis gjøgnum vørukeyp ella óbeinleiðis gjøgnum ringárinini og almennu nýtsluna, sum er beinleiðis og óbeinleiðis fíggjað av uttanlandsinntøkunum.

Fyritreytirnar aftanfyri útrokningarnar eru hjálagdar í fylgiskjali 1.

### 5.1. Vøru- og tænastukeyp skapa ringárin

Gjøgnum íløgur og keyp skapar uttanlandssjóinntøkan eitt virksemi í búskapinum. Hetta virksemið er roknað til at hava ein lønarumsetning á umleið 67 mió. kr. í 2008. Sjálvur umsetningurin av íløgunum og vøru- og tænastukeypinum er nakað væl størri, men her er einans lønarparturin nevndur, tí hesin gevur eina góða ábending av støddini av virkseminum. Ein lønarpartur á 67 mió. kr. skal síggjast í mun til, at samlaða uttanlandssjóinntøkan í 2007 er umleið 260 mió. kr., og harav eru út við 60 mió. kr. goldnar í skatti í útlandinum og í Føroyum.




**Mynd 10. Nýtslan av uttanlandssjóinntøkuni er við til at skapa virksemi í føroyska samfelagnum. Hetta virksemið er roknað til uml. 67 mió. kr. í 2008.**
Kelda: TAKS og egnar útrokningar.

## 5.2. Grundarlag undir almennum virksemi

Uttanlandssjóinntøkurnar og avleidda virksemið skapa gjøgnum skatt og avgjøld inntøkur til almennu kassarnar hjá landi og kommunum og eru harvið við til at fíggja almenna virksemið. Almenna virksemið er lutvíst beinleiðis við til at fíggja seg sjálvt, við tað at alment sett eisini gjalda skattir og avgjøld, og lutvíst óbeinleiðis, við tað at almenna virksemið eisini skapar ringárin á búskapin.

Nærri er greitt frá inntøkunum til almennu kassarnar á síðu 40.

Við at nýta vanliga lutfalsliga býtið av almennu útreiðslunum er gjørligt at finna fram til, hvussu stórur lønarparturin av almennu útreiðslunum er, og hvørja ávirkan hesar hava á búskapin. Samlaðu almennu lønarútreiðslurnar, sum eru beinleiðis og óbeinleiðis fíggjaðar av uttanlandsinntøkunum eru roknaðar til góðar 200 mió. kr. í 2008. Saman við upprunaligu uttanlandsjóinntøkunum og avleidda virkseminum eru hetta við til at lyfta samlaðu lønarútreiðslurnar upp á knappar 600 mió. kr. (Mynd 11)




**Mynd 11. Uttanlandssjóinntøkurnar og avleidda virksemið er við til at fíggja alment virksemi. Hetta er roknað til góðar 200 mió. kr. í 2008.**
Kelda: TAKS og egnar útrokningar.

## 5.3. Samlaða árinið á búskapin

Samlaða árinið á búskapin er árinið frá:

- Uttanlandssjóinntøkunum hjá sjófólki undir DIS, NIS, Grønlandi og Kanada
- Avleitt virksemi av vøru- og tænastukeypi frá uttanlandsinntøkunum
- Alment virksemi fíggjað av uttanlandsinntøkunum og harav avleiddum virksemi
- Avleitt virksemi av almennum vøru- og tænastukeypi

Støddin av avleidda virkseminum og almenna virkseminum er greitt frá omanfyri. Eftir er tó avleidda privata virksemið, sum er avleitt av almenna virkseminum. Hetta er roknað til at vera um 30 mió. kr. í lønarútreiðslum í 2008.

Samlaða árinið er harvið nakað væl størri enn upprunaliga uttanlandssjóinntøkan. Oman á uttanlandssjóinntøkuna á 320 mió. kr. skulu leggjast alment virksemi á 200 mió. kr. og avleitt virksemi á umleið 67 og 30 mió. kr. Tilsamans gevur hetta næstan 620 mió. kr. – t.v.s. útvið tvífalt upprunaligu inntøkuna á 320 mió. kr. (Mynd 12)

Harvið sæst, at hóast uttanlandsinntøkan verður skattað í útlandinum, er hon við til at skapa munandi virksemi í føroyska búskapinum, nevniliga umleið eins stórt virksemi sum sjálv óskattaða uttanlandssjóinntøkan.




**Mynd 12. Samlaða búskaparliga árinið av uttanlandssjóinntøkunum er umleið tvífalt so stórt sum upprunaliga uttanlandssjóinntøkan. T.v.s. frá at vera ein inntøka á 320 mió. kr. eru lønirnar gjøgnum avleitt virksemi og alment virksemi økt til út við 620 mió. kr. í 2008.**
Kelda: TAKS og egnar útrokningar.

## 5.4. Inntøkur fyri land og kommunur

Uttanlandssjóinntøkan er, sum nevnt, við til at skapa inntøkur í almennu kassarnar í Føroyum. Inntøkurnar stava frá øllum liðum á áðurnevndu ketu, nevniliga frá sjálvari uttanlandsinntøkuni, frá avleiddum virksemi og frá almennum virksemi.

Beinleiðis skattainntøkan frá uttanlandssjóinntøkunum var rættiliga avmarkað, 8,5 mió. kr. í 2008. Harafturímóti var inntøkan frá avgjøldum omanfyri 68 mió. kr. Góðar 37 mió. kr. komu inn í skatti og avgjøldum frá avleiddum virksemi frá uttanlandsinntøkunum. Umleið 111 mió. kr. stavaðu frá inntøkum av almenna virkseminum og 17 mió. kr. frá avleiddum virksemi av almenna virkseminum.

Samanlagt var talan um 242 mió. kr. í almennum inntøkum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stavaðu frá uttanlandssjóinntøkunum.

Til samanberingar kann nevnast, at samlaða inntøkan hjá landi og kommunum í 2008 lá um 5,5 mia. kr. Tað vil siga at roknast má við at millum 4 og 5 prosent av samlaðu inntøkunum hjá almennu kassunum í 2008 beinleiðis og óbeinleiðis stavaðu frá uttanlandsjóinntøkunum.




**Mynd 13. Hóast beinleiðis skatturin av uttanlandsinntøkuni er sera avmarkaður, kemur rættiliga fitt inn í almennu kassarnar gjøgnum avgjøld og avleitt virksemi. Tilsamans var talan um 242 mió. kr. í 2008.**
Kelda: Egnar útrokningar.

## 6. Gongdin undir DIS-skipanini

Tað er líkt til, at talið av sjómonnum undir Grønlandi og Kanada er nøkulunda støðugt. Ein áhugaverdur spurningur kann vera at hyggja at, um vaksandi talið av føroyskum sjófólkum undir DIS- og NIS-skipanunum er nakað, sum fer at halda fram ella ikki.

Tað hevur ikki verið gjørligt at funnið tøl fyri NIS-skipanina, men áhugaverd tøl eru at finna fyri donsku DIS-skipanina.




**Mynd 14. Tal av dønum í DIS skipanini og samlaða talið í DIS.**
Kelda: DIS-skipanin.

Talið av størvum undir DIS-skipanini er økt úr umleið 2.000 til umleið 10.000 frá 1988 til 2008. Í sama tíðarskeiði er lutfallið av donskum størvum í skipanini fallið úr umleið 85 prosentum niður í 45 prosent. Tað kann tí tykjast, sum um danir verða trokaðir burtur úr skipanini av bíligari útlendskari arbeiðsmegi.

Her skal havast í huga, at føroyingar verða skrásettir sum danskarar í skipanini – t.v.s. tað kann eisini tykjast, sum um at føroyingar verða trokaðir burtur úr skipanini. Hetta er tó ikki í samsvar við mynstrið, vit sóu omanfyri, har talið av føroyskum sjófólkum undir DIS-skipanini var vaksandi. Orsøkin til ósamsvarið er, at hóast tað eru lutfalsliga færri danskarar (og føroyingar) í DIS-skipanini, so er talið framvegis vaksandi. Talið av útlendskum

sjófólkum undir DIS-skipanini økist tó meiri enn talið av føroyskum og donskum sjófólkum. Harvið minkar lutfallið millum donsk og útlendsk sjófólk í skipanini.




**Mynd 15. Tal av donskum yvirmonnum í DIS skipanini og samlaða talið av yvirmonnum í DIS.**
Kelda: DIS-skipanin

Verður hugt eftir yvirmonnum undir DIS-skipanini, sum er mest áhugavert fyri føroysk sjófólk, er mynstrið nakað tað sama, men ikki heilt so markant. Talið av sjófólkum í skipanini er vaksið úr sløkum 600 til sløk 4.000 í tíðarskeiðinum 1988 til 2008, meðan lutfallið av føroyskum og donskum yvirmonnum er fallið úr 95 niður í umleið 65 prosent.

Ilt er at siga, um gongdin fer at halda fram í komandi árum.

## Fylgiskjal 1. Fyritreytir fyri útrokningum av árinum

Hetta fylgiskjalið lýsir fyritreytirnar aftan fyri útrokningunum av samfelagsligu árinunum av uttanlandssjóinntøkunum.

Talva 2 (niðanfyri) vísir fyritreytirnar fyri útrokningunum av, hvussu útlendsku inntøkurnar verða skattaðar og nýttar í Føroyum og útlandinum. DIS-inntøkurnar verða ikki skattaðar, meðan NIS-inntøkurnar og inntøkurnar úr Grønlandi og Kanada verða fyrst skattaðar í útlandinum, og síðan verður álíknaður føroyskur skattur.

Prosentsatsirnir eru leysliga mettir í samráð við TAKS. Tað hevur ikki verið gjørligt at funnið meiri nágreiniligar satsir, men hildið verður, at metingin er á góðari leið.

Eftir at skatturin er roknaður frá, er partur roknaður til uppsparing.

Eftir uppsparingina er restin roknað til nýtslu, harav 20 prosent til nýtslu uttanlands og 80 prosent innanlands.

Av innanlands nýtsluni er roknað 35 prosent í avgjøldum. Størsti parturin av hesum er MVG, men nakað er skrásetingargjald av bilum v.m.

| Fyritreytir fyri útrokningunum | | | |
|---|---|---|---|
| Útlendskur skattur av NIS v.m. | 30 | % | av skattskyldugu inntøkuni |
| Føroyskur skattur av NIS v.m. | 5 | % | av skattskyldugu inntøkuni |
| Uppsparing | 7 | % | av skattaðu inntøkuni |
| Nýtsla uttanlands | 20 | % | av inntøkuni eftir uppsparing |
| Nýtsla í Føroyum | 80 | % | av inntøkuni eftir uppsparing |
| Avgjøld | 35 | % | av føroysku nýtsluni |

**Talva 2. Prosentsatsir aftanfyri útrokningum av samfelagsligu árinunum**

Talva 3 (niðanfyri) vísir býtislykilin av almennu útreiðslunum frá 2003, sum er seinasta tøka uppgerðin hjá Hagstovu Føroya yvir samlaðu almennu nýtsluna (land og kommunur).

Býtislykilin er nýttur at rokna árinið av almennu nýtsluni. Av tí at ymisk sløg av almennari nýtslu hava ymisk árin á búskapin, er neyðugt at vita, hvat vanliga mynstrið av almennu nýtsluni er.

| Býtislykil frá 2003 | |
|---|---|
| | |
| Lønir | 35% |
| Nýtsla | 15% |
| Studningur | 4% |
| Inntøkuflytingar | 28% |
| Íløgur | 14% |
| Rentur | 4% |
| | 100% |

**Talva 3. Býtislykil av almennu útreiðslunum.**
*Kelda Hagstova Føroya.*

Talva 4 vísir árinið á samfelagsbúskapin av ymsu almennu útreiðslubólkunum.

| Faktor | |
|---|---|
| Lønir | 3 |
| Nýtsla | 2,5 |
| Studningur | 2,5 |
| Inntøkuflytingar | 1,5 |
| Íløgur | 1,7 |
| Rentur | 1 |
| Ríkið | 1 |
| Aðrar útreiðslur | 1 |
| Avlop | 1 |

**Talva 4. Multiplikatorfaktorar til árin av almennu útreiðslunum.**
*Kelda Hvítabók, Fylgibind 1.*

# Keldur

A Nordic Approach to Labour Market Policy, Nord 1995:29, Nordic Council of Ministers / The Nordic Council, Copenhagen 1996.

Dansk International Skibsregister (Søfartsstyrelsen www.dma.dk)

Dansk Skibsfartspolitik (Søfartsstyrelsen www.dma.dk)

DIS-Hovedaftalen mellem Søfartens Ledere/Dansk Navigatørforening, Maskinmestrenes Forening, Dansk Sø-Resturations Forening og Metal Søfart – og – Danmarks Rederiforening, Rederiforenng af 1895 og Rederiforeningen for mindre skibe.

DIS-skipanin.

FAS, Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin, www.fas.fo

Grønlands Statistik

Hvítabók, bind 1, Føroya Landsstýrið 1999.

Johansen, S.: Til lands - Útróður í Íslandi. Tórshavn. 1982.

KPMG.no Verd at vite 06/07

Lov om folketrygd (norska lógin)

Offshoreforeningen, 28.11.06 – www. offshoreforeningen.no

Olsen, Ó.: Sigling & Útbúgving I og II, Argir. 2003.

Oplysningssedlen 2007 for søfarende DIS-Indkomst (Dansk Internationalt Skibsregister)

Overenskomst mellem Danmarks rederiforening og Søfartens Ledere 1. april 2007 – 1. april 2010.

Patursson, E.: Fiskiveiði - Fiskimenn, bd. I-II. Tórshavn. 1961.

Patursson, E.: Fiskivinna og fiskivinnumál 1940-1970, bd. i, Tórshavn. 1979.

Redegørelse fra Arbejdsgruppen vedrørende lønforholdene på Færøerne, Maj 1976.

www.skat.dk (danska skattavaldið)

www.skatteetaten.no (norska skattavaldið)

Skibsregistrene www.nis-nor.no

Spekt, 7. mars 2008.

Spekt, 25. oktober 2007 (fyri Maskinmeistarafelagið)

Søfartsstyrelsen (www.dma.dk)

TAKS

Tvískattasáttmáli millum Føroyar og Grønland

Wahl, Asbjørn, 1999: "50 år i kamp mod global kapital" í Dagbladet Arbejderen 10. august 1999.

Økonomi- og erhvervsministerens Redegørelse af 28/4 04 om Dansk Internationalt Skibsregister sammenlignet med andre internationale registre

GRANSKINGARDEPILIN FYRI SAMFELAGSMENNING